LM-088/2023

Løgtingslóg 19.

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Løgmálaráðið
Gongin 7
Postrúm 337
FO-110 Tórshavn

5. februar 2024
J-nr: 24/00085

Hoyringssvar í samband við uppskot til Løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin)

Viðmerking til § 16 stk. 2: "Serkøn hjá Føroya Kærustovni í hesum málum eru ein serlækni í kvinnusjúkum ella ein barnalækni og ein serlækni í psykiatri ella persónur, sum hevur serligt innlit í sosialmedisin."

Spurnartekn verður sett við tørvin á at hava ein barnalækna við í lógini. Barnalæknin hevur stórt sæð ongar royndir í tílíkum málum og møtir stórt sæð ongantíð einari kvinnu/barnið, sum ynskir forsturtøku. Um man metir serfrøðina hjá barnalæknanum verða týdningarmikla (ímun til um fostri ber brek e.l), so kann barnalæknin hoyrast í málinum.

Viðmerking til "1.4.7. Aðrar skipanir og onnur lóggáva" og "1.4.7.5. Sterilisatión":

Sjúkrahúsverkið megnar ikki at raðfesta sterilisatiónir av monnum, innan 6 mánaðar loyvið gongur út. Sjúkrahúsverkið kann ikki raðfesta sterisilatión av monnum framum viðgerð av sjúku.

Vit vilja tí heita á lógarmynduleikan, við tilvísing til síðu 13 og 15 í uppskotinum um løgtingslóg um fosturtøku, at brúka høvið til at hyggja eftir sterisilatiónslógini, við atliti til sterisilatión av monnum eisini. Soleiðis at m.a. skipanin við 6 mánaðar loyvum verður avtikin.

Vinarliga

Steinar Eirikstoft
Forstjóri